# BÍÐA ENN EFTI

**FERÐSLA** Liðin er skjótt fýra ár, síðani 300 kollfirðingar savnaðu saman undirskriftir fyri at vísa á ta vantandi ferðslutrygdina í longu heimbygd teirra. Síðani tá er ferðslan bara økt og økt, samstundis sum lítið og einki er gjørt fyri trygdina hjá teimum gangandi og súkklandi í bygdini. - Í dag er støðan hon, at tað er rættiliga sjáldan, at ein sær fólk súkkla eftir bygdarvegnum. Tey tora simpelthen ikki, sigur Una Simonsen, sum var ein av stigtakarunum til áheitanina



Snorri Brend

**Kollafjørður:** - Fyrr var tað stuttligt at kunna ganga og súkkla í bygdini. Men í dag er hesin stuttleikin ikki til longur. Hann er ístaðin avloystur av ótta!

Soleiðis varð sagt henda dagin í november mánaði 2006, tá fleiri kollfirðingar hittu Heðin Mortensen, borgarstjóra í Havn á máli, fyri at tosa um eitt av teirra hjartamálum: Ferðslutrygdina í heimbygdini.

Nógv varð gjørt burtur úr hesi áheitanini tá, og miðlarnir vístu hesi sjálvsøgdu áheitanini stóran áhuga. Men síðani hevur lítið verið at hoyrt um ferðslutrygdina í Kollafirði, hóast vandin ikki er vorðin minni við tíðini.

Ístaðin sær tann, ið koyrir gjøgnum bygdina at fólk á ein hátt hava tikið málið - ella ferðslulógina - í egnar hendur. Sum ein av myndunum vísir sær ein fleiri staðir, at boyur sum verða lagdar eftir vegnum, soleiðis at bilarnir verða noyddir at halda av fyri hvørjum øðrum.

**»** **Fyrr var Kollafjørður ein bygd, har fólk bæði gingu og súkklaðu nógv. Men soleiðis er tíverri ikki longur**

Men veruleikin er framvegis hann, at fólk kenna seg ikki tryggan, tá tey ferðast eftir bygdarvegnum. Og mong foreldur tora haraftrat illa at loyva børnum sínum út at spæla, tí bygdavegurin liggur beint við tún teirra.

- Her er snøgt sagt vorðið ov vandamikið. Og tað kunna vit ikki liva við í framtíðini, søgdu teir fimm stigtakararnar á sinni – Makonny Dickson, Edil Thomsen, Eyfinn Joensen, Femja Hansen og áðurnevnda Una Simonsen.

Í áheitanini ynsktu tey ein fund við býráðið, har tey í felag kundu tosa nærri um, hvussu trupulleikarnir skulu loysast. Borgarstjórin lovaði, at nú skuldi okkurt henda.

- Men eg veit ikki, hvussu leingi vit skulu bíða aftrat, inntil nakað verður gjørt. Eg meini, nú er skjótt liðin fýra ár, sigur Una Simonsen. - Tað kann so ikki kallast "skjótt".

## Eingin tryggleiki

Stigtakararnir bæði vóru og eru framvegis á einum máli um, at heimbygd teirra er ein sonn perla.

Bygdin er vøkur og ein frálík bygd, og tí hava tey valt at búseta seg júst her. Hon er haraftrat longsta bygdin í landinum, og er sermerkt av, at teir mongu og hugnaligu býlingarnir binda bygdina saman.

Men, tey staðfesta samstundis ein syrgiligan veruleika: Fyrr var Kollafjørður ein bygd, har fólk bæði gingu og súkklaðu nógv. Men soleiðis er tíverri ikki longur.

- Orsøkin til hetta er hin einfalda, at tað er ikki longur trygt at ferðast á bygdarvegnum, siga teir hørmu kollfirðingarnir.

Teir sláa stutt og greitt fast, at tann økta ferðslan – og ikki minst nógva ferðin – er vorðin til ein stóran ótta hjá bygdarfólkinum.